# Stórslignar konsertir



*Saman við GHM og ikki færri enn trimum kórum fer Eivør Pálsdóttir at hava jólakonsertir hetta vikuskiftið*

Talan verður um forvitnisligar konsertir, sum GHM saman við Felagskórinum Gøta/Leirvík, Vestmanna sangkóri, Tórshavnar Kamarkóri og Eivør Pálsdóttir fer at halda hetta vikuskiftið. Konsertirnar eru tríggjar í tali, og verður lagt fyri fríggjakvøldið kl. 20, tá konsert verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna. Leygardagin kl. 15 er konsert í Gøtu Kirkju, og sunnudagin kl. 16 verður tað so í Vesturkirkjuni í Havn.

Tað hevur verið fastur táttur hjá GHM er at spæla á jólakonsertini í Vesturkirkjuni saman við Havnar Hornorkestri og skiftandi kórum. Í ár hevur GHM so tikið stig til sína egnu jólakonsert og hevur boðið trimum kórum, Felagskórinum Gøta/Leirvík, Vestmanna sangkóri og Tórshavnar Kamarkóri, at vera við til at framføra eina fjølbroytta skrá við jólatónleiki. Stórt kór saman við harmoniorkestri er ikki roynt fyrr her heima, men nú GHM er vorðið so stórt harmoniorkestur, har mest sum øll ljóðførini, sum eitt tílíkt orkestur eigur at hava, eru umboðað, er hetta á fyrsta sinni møguligt.

Sum skilst, so verður talan um eina sera fjølbroytta konsert. Byrjað verður við, at hvørt kórið sær og eitt felagskór við øllum sangarunum - eini 80 í tali - syngja bæði útlendskar og føroyskar jólasangir. Eisini tekur Eivør Pálsdóttir lut í hesum, tá hon framførir eitt nýtt jólalag.

Síðani verða framførd seks verk fyri kór og harmoniorkestur. Hetta eru fyri tað mesta kendir tónar, eitt nú Away in a Manger, ein sirpa við kendum jólasangum úr ymsum londum, tvey verk úr kantatum hjá J.S. Bach og tað kenda lagið hjá Irwing Berlin, White Christmas.

Kór- og orkesturleiðsluna hava Heðin Kambsdal og Kári Bæk.

























